# UMSÓKN UM NAVNALOYVI TIL BARN

| |
|---|
| ***Umsóknin skal sendast til:***<br>***Umhvørvisstovan, Traðagøta 38, Postboks 2048, FO-165 Argir*** |
| Navn, bústaður, telefonnr. og teldupostadressá hjá tí, sum Umhvørvisstovan skal venda sær til fyri at fáa fleiri upplýsingar ella skjøl:<br><br>**Navn:** |
| **Bústaður (gøta og býur/bygd):** |
| **Telefonnr.**          **Teldupostur:** |
| **Navnaloyvið skal sendast til:**<br><br>□ omanfyri nevnda persón<br>□ annan (um so er, upplýs navn og postadressu v.m. her): ____________________<br><br>____________________________________________ |
| **Váttanir, ið altíð skulu leggjast við umsóknini:**<br><br>**1.** Føðifráboðan fyri barnið, ið umsóknin viðvíkur (fæst frá jarðarmóðir ella presti)<br>**2.** Avrit av kvittan fyri gjald, *men bert um so er, at barnið ikki hevur fingið navn innan 6 mán.*, sí hjáløgdu §§ 14-17 í løgtingslóg nr. 41 frá 26. mars 2002 um fólkanøvn. Gjald fyri navnaprógv verður goldið gjøgnum banka ella sparikassa til Føroya Gjaldstovu, viðmerkt ”navnaprógv” |

**Upplýsingar um foreldur barnsins:**

| **Navn og bústaður** | **Føðingardagur og ár** | **Borgarastøða** | **Ríkisborgaraskapur** |
|---|---|---|---|
| Mamman: | | ☐ gift ☐ ógift<br>☐ annað | |
| Pápin: | | ☐ giftur ☐ógiftur<br>☐ annað | |
| **Eru foreldrini gift, skal vígsluváttan leggjast við.** | | | |

**Um foreldrini ikki eru gift - hvør hevur foreldramyndugleikan:**

☐ mamman ☐ pápin ☐ felags foreldramynugleiki

**Váttan um foreldramyndugleikan skal leggjast við.**

**Barnið er føtt tann:** ___________________________

**Vit ynskja, at barnið skal eita:**

_____________________________________________________________________________________

**Frágreiðing um navnaynskið:**

_____________________________________________________________________________________

_____________________________________________________________________________________

_____________________________________________________________________________________

_____________________________________________________________________________________

_____________________________________________________________________________________

_____________________________________________________________________________________

_____________________________________________________________________________________

**Útlendingar:**

- Um foreldrini, ella annar teirra, eru útlendingar, og søkt verður um navn eftir navnasiði í heimlandinum, mugu *foreldrini* eisini útvega bræv frá myndugleikunum í heimlandinum, ella avvarðandi ambassadu, sum váttar navnasiðin í heimlandinum. Brævið má vera undirskrivað og stemplað av myndugleikanum, og vera á enskum (ella ensk umseting fylgja við). Um trupulleikar eru at útvega eina slíka váttan, ber til at venda sær til Umhvørvisstovuna til at fáa vegleiðing.
- Avrit av passi hjá tí, sum ikki hevur føroyskan heimarætt, skal eisini leggjast við.

**Dagfesting og undirskrift foreldramyndugleikans:**

______________________ ______________________________________________
dagf. móðir

______________________ ______________________________________________
dagf. faðir

## Gjald fyri navnaprógv o.a.

## Løgtingslóg nr. 41 frá 26. mars 2002 um fólkanøvn

### Kapittul VI
### Gjald fyri navnaprógv o.a.

**§ 14.** Fyri navnaprógv verður latið eitt gjald uppá kr. 1.000,- til landskassan. Gjaldið verður latið samstundis, sum umsókn um navnaprógv verður send landsstýrismanninum.
*Stk. 2.* Fevnir umsóknin um fleiri persónar, verður latið gjald fyri hvønn teirra.
*Stk. 3.* Tó skal bert latast eitt gjald, um umsóknin fevnir um:

1) hjún,
2) systkin undir lógaldri ella
3) foreldur og børn teirra, sum eru undir lógaldri.

*Stk. 4.* Viðvíkjandi stjúk- ella fosturbørnum verður fyriskipanin í stk. 3 um systkin og børn undir lógaldri nýtt samsvarandi.
*Stk. 5.* Verður navnaprógv ikki givið, verður gjaldið afturrindað umsøkjaranum/ umsøkjarunum.

**§ 15.** Gjald verður ikki latið fyri navnaprógv til barn, um umsóknin er send landsstýrismanninum innan 6 mánaðir eftir, at barnið er føtt, ella innan 6 mánaðir eftir, at barnið er ættleitt.

**§ 16.** Fólk, sum ikki eru skrásett í kirkjubók í Føroyum, ella ikki eru gift hjá einum myndugleika her á landi, men sum í aðrar mátar hava rætt til at broyta navn við fráboðan, kunnu við navnaprógvi frá landsstýrismanninum fáa loyvi at broyta navnið.
*Stk. 2.* Navnabroyting, ið kann loyvast við fráboðan - annaðhvørt til skrásetingarmyndugleikan ella vígslumyndugleikan - kann eisini loyvast við navnaprógvi í sambandi við, at navn verður broytt við heimild í § 5, stk. 2, §§ 10 og 11.
*Stk. 3.* Einki gjald verður latið fyri navnaprógv sambært stk. 1.

**§ 17.** Einki gjald verður latið fyri navnaprógv við heimild í § 11, stk. 1, nr. 4.